# Almenni Bygdaráðsfundurin 05.02.2007

**Mál nr. 1/2007 Fíggjarmál.**
**Skálafjarðar Sløkkilið**
**Frágreiðing:** 15. jan. 2007 sendur Skálafj. kommunala Sløkkilið limakommununum skriv, har teir siga frá, at nevndin hevur samtykt at seta brunaumsjónarmannin í fulltíðarstarv frá 1. mai 2007, tí tað meta teir er neyðugt, við teimum øktu uppgávunum til tilbúgvingina.
Kostnaðurin verður 15 kr. pr. íbúgva fyri 2007 og tað verður (5.904 fólk x 15,00 kr. = 88.560,00) og kommununar partur verður (88.560 - 5.940 fólk x 1260 fólk) = 18.240,00 kr.

Fíggjarnevndin mælir til at hækka játtanina til Skálafjarðar Kommunala Sløkkilið, eina meirjáttan á kto. nr. 230300, uppá 18.240,00 kr. Peningurin skal takast av tøkum peningi.

**Avgerð;** Tilmælið frá Fíggjarnevndini einmælt samtykt.

**Mál. nr. 2/2007 Byggimál**
**Seyðhús til Nes Haga.**
**Frágreiðing:** umsókn dagfest 31.08.2002 søkja tit um byggiloyvi til eitt seyðhús úti á Rætt á matr. nr. 155 a Nes hagi. (Sama umsókn er send kommununi 23.10.04)
Seyðhúsið sum byggjast skal er 19 metur langt og 5,5 metur breitt við lágari reising.
Nes kommuna sendi umsóknina til Friðingarnevndina fyri Eysturoy, sum var á staðnum hin 16.11.04, og samtykti at geva loyvi til byggjan av seyðhúsið úti á Rætt, við teimum treytum:
At ætlaða byggingin ikki fer at misprýða landslagið At liturin á húsinum fellur væl inn í landslagið.

- At møgulig sár í lendi í samband við útgrevstur vera sett í stand aftur, so lendi kann varðveita so nógv av sínum náttúrliga skapi sum gjørligt.
- At bygt verður so lágt sum gjørligt, og at í minsta lagi helvtin av undirhæddini – grundini – verður niðan fyri lendi á sléttanum beint oman fyri bøgarðarnar á staðnum, so sum minst sæst til bygningin,
- At møgulig frárensl frá bygninginum og økinum verða gjørd eftir nærri ásetingum frá byggimyndugleikunum vísandi til umhvørvislógina.
- At laða brúgv verður gjørd um ánna og áarløkurin verður varðveittur í mest møguligan mun.
- At viðv. vegaíbinding og vatníbind verður víst til Landsverk og kommununa.
- At hetta ikki frítikeur umsøkjaran at fáa neyðug loyvi frá byggimyndugleikunum.

Yvirfriðingarnevndin viðgjørdi umsóknina á fundi hin 12. juli 2005 og staðfesti avgerðina hjá Friðingarnevndini fyri Eysturoy við hesi eyka treyt:

- At húsið verður málað svart.

Tekniska nevnd mælir til at játta byggilolyvið við vanligum treytum samb. byggisamtyktina og teimum treytum sum Friðingarmyndugleikarnir seta, og vísa teimum á, hvar bindast kann í kloakk- og vatnleiðingarnar.
Atkomuvegurin verður antin úr vegnum niðan til Villa, ella úr vegnum oman fyri Líðarsendahúsini.

**Avgerð:** Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 3/2007 Byggimál**
**Umsøkn um byggiloyvið.**
**Frágreiðing:** Hin 16.01.2007 søkir Jónstein Olsen um byggiloyvi til sethús á matr. 383c inni í Hjøllum.
Húsini verða í 2 hæddum við lágari reising, 15,5 m long, 7,40 m breið í sunnara enda og 11,70 m breið í norðara enda, har er útbygningur sum er 4,30 m x 5,60m.

Tekniska nevnd mælir til at játta Jónstein Olsen byggiloyvið til sethúsini samb. innsendu tekning, eftir vanligum treytum.
Húsini verða plaseraðið 2,5 metur norður frá suðurmarkinum.
Húsini verða plaseraðið soleiðis sum tekning frá Teknisku deild dagf. 19.01.2007 vísur.
Kloakkin skal bindast í verandi kloakk vestan fyri grundøkið.
Súni í Hjøllum var úti meðan málið var viðgjørt.

**Avgerð:** Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 4/2007 Byggimál**
**Frágreiðing:**Hin 03.01.2007 søkja Hanna og Kristin Nordendal um loyvi til at byggja carportur omanfyri húsini, sum viðlagda tekning vísir.

Tekniska nevnd mælir til at játta byggiloyvið til carportur sambært innsendu tekning og eftir vanligum treytum.

**Avgerð:** Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 5/2007 Umhvørvismál**
**Stuðul til planting.**
**Frágreiðing:** Skriv er komið 12.01.2007, frá Agenda 21 Stovuni, har víst verður á, at kommunur, feløg og einstaklingar kunna søkja um stuðul til planting av trøum.

Mentanarnevndin mælir til, at Tekniska deild mátar økið upp fram við vegnum frá Toftagjógv og inn í Oyrar og kannar hvussu nógvum trøum pláss er fyri, og at søkt verður um stuðul.

**Avgerð:** Tilmælið frá Mentanarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 6/2007 Skúlamál**
**Heilsupolitikkur í skúlunum.**
**Frágreiðing:**Almanna- og heilsumálaráðið sigur í brævið 17.11.2006 frá, at sambært kunngerð nr. 79 frá august 2006, um studning til heilsupolitikk í fólkaskúlanum, gongur heimildin út 31.12.2006. Av somu orsøk fer landið ikki at veita stuðul til tiltakið eftir nevnda dag.
Landstýrismaðurin vónar, at kommunurnar fara at halda áfram við skipanini, eins og Løgtingið mælti til, og veita stuðul í 2006 og framyvir, so næmingarnir framhaldandi kunnu fáa eitt heilsugott kostískoyti.

Mentanarnevndin mælir frá, at kommunan yvirtekur kostskipanina.

**Avgerð:** Tilmælið frá Mentanarnevndini samtykt.

**Mál nr. 7/2007 Skúlamál**
**Umsøkn um stuðul.**
**Frágreiðing:** 9. flokkur í Tofta skúla hevur ætlanir um at fara á vitjan í Hveragerði í apríl 2007.
Við á ferðini verða 16 næmingar og 3 leiðarar.
Túrurin kemur at kosta uml. kr. 6.500,00 fyri hvønn, ella íalt uml. 123.500,00. Hetta er fyri ferðaseðil, uppihald og útferðir.

Umsøkn um at Nes kommuna vil stuðla hesum túri við eini peningaupphædd. Tey síggja henda túr sum ein part av samstarvinum við Hveragerði.

Mentanarnevndin mælir til, at kommunan stuðlar námsferðina hjá 9 flokki, við kr. 5.000,00.
Stuðulin verður veittur fyri arbeiðið, sum flokkurin kemur at gera hjá kommununi, eftir ávísing frá Teknisku deild.

**Avgerð:** Tilmælið frá Mentunarnevndini samtykt.

**Mál nr. 8/2007 Mentamál**
**Umsøkn um stuðul.**
**Frágreiðing:** Bygdasavnið í Nes kommunu søkir í skrivi 16.12.2006 um kr. 95.000,00 í stuðli fyri 2007. Sambart rækstrarætlan.

Mentanarnevndin mælir til, at hækka játtanina fyri 2007 við 5.000,00 kr. tvs. úr kr. 90.000 upp til kr. 95.000 út frá samtyktini um, at kommunan vildi hækka sína játtan lutfalsliga eftir játtanini frá landinum. Tann samlaða játtanin frá kommununi til Bygdasavnið fyri 2007 verður sostatt 95.000,00.

**Avgerð:** Tilmælið frá Mentanarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 9/2007 Vesturskin.**
**Stuðul til umsorganararbeiðið.**
**Frágreiðing:** Nes kommuna søkti um stuðul til umsorganararbeiðið í Vesturskin stendur fyri, og var henda upphæddin uppá 370.000,00 kr. Kommunan hevur fingið játta fullan stuðul til Mattænastuna kr. 150.000,00 og fullan stuðul til koyritænastuna kr. 50.000,00 kr.
Meðan onki fekst til dagtilhald og tilfar til ítriv og útferðir hjá Vesturskin.

Trivnaðarnevndin staðfestur játtanini til umsorganararbeiðið í Vesturskin og mælir til, at kommunan ger neyðugt kunningararbeiðið til pensjónistarnar í økinum um hesa mattænastu.

Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum frá Trivnaðarnevndini.

**Avgerð:** Tilmælini frá Trivnaðarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 10/2007 Dagtilhaldið.**
**Stuðul til Dagtilhaldið.**
**Frágreiðing:** Nes kommuna hevur søkt um stuðul til Dagtilhaldið uppá 350.000,00 kr. og hevur kommunan fingið játtað kr. 267.000,00 kr.

Trivnaðarnevndin staðfestur játtanini til Dagtilhaldið, og mælir til at kommunan lýsir eftir starvsfólki.
at søkt verður eftir einum námsfrøðingi at arbeiða 20 tímar um vikuna.
At nevndin fyri tilhaldið saman við starvsfólkinum leggur arbeiðið í Tilhaldinum til rættis.

Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum frá Trivnaðarnevndini.

**Avgerð:** Tilmælini frá Trivnaðarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 11/2007 Starvsfólkamál.**
**Vaskiarbeiðið.**
**Frágreiðing:** Nes kommuna hevur søkt eftir vaskifólki til spælistovuna at arbeiða 10 tíma viku at byrja 15.jan. 2007. Eftir at freistin var úti, vóru 10. umsóknir innkomnar til starvið.

Trivnaðarnevndin mælir til at fylgja innstillingini hjá leiðaranum og seta Karin Andreasen, Toftir í starvið.

**Avgerð:** Tilmælið frá Trivnaðarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 12/2007 Fíggjarmál.**
**Útgerð til Vesturskin.**
**Frágreiðing:** Í skrivi og umsókn dagfest 27.01.2007 søkir Kirkjuráðið um loyvi til at seta útgerð upp á Vesturskin, so samsending kann vera frá Fríðrikskirkjuni. Tað eru fleiri eldri sum ikki orka at koma í kirkju longur, so "at búfólkið kann fáa møguleika til at síggja og hoyra tað sum fer fram í Fríðrikskirkjuni"..
Sendiútgerð skal setast upp í Fríðrikskirkjuni og móttøkuútgerð setast upp á Vesturskin.
Kostnaðurin av hesum er uml. 30-35.000,00 kr. íalt og kirkjuráðið hevur játtað 20.000,00 kr.
Kirkjuráðið spyr í hesum sambandi, um kommunan vil luttaka í útreiðslunum fyri útgerð og innstallatión á Vesturskin.

Fíggjarnevndin mælir til, at taka undir við, at útgerð verður sett upp á Vesturskin í samráð við leiðslu og búfólk á Vesturskin og mælir harumframt til, at kommunan játtar upp til 15.000,00 kr. til keyp og uppsetan av útgerðini. Peningurin verður tikin av rakstrinum hjá Vesturskin.

**Avgerð:** Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.
Petur J. Petersen og Súni í Hjøllum vóru úti, meðan málið var viðgjørt.

**Mál nr. 13/2007 Byggimál.**
**Umsøkn um byggiloyvið**
**Frágreiðing:** Í umsókn dagfest 05.02.2007 søkja Oddvá og Mortan Hansen, um byggiloyvi til sethús síni við Gaddavegin.

Tekniska nevnd mælir til at játta byggiloyvið sambært innsendu tekning og sambært galdandi byggisamtykt.
Plaseringin verður samb. tekning frá Teknisku deild dagfest 05.02.2007.

**Avgerð:** Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 14/2007 Sparkivøllurin.**

**Frágreiðing:** Nes kommuna hevur søkt FSF um tveir sparkivallir í kommununi, tann eini er lagdur í Saltnesi, og nú er játtan komin um tann seinra, sum skal verða á Nesi.

Mentanarnevndin og Tekniska nevnd mæla til, at sparkivøllurin verður lagdur við Gaddavegin, beint norðanfyri Kvíggjarheyggj. samsvarandi tilráðingini frá juni 2006.

**Avgerð:** Tilmælini frá Mentanarnevndini og Teknisku nevnd samtykt.

**Mál nr. 15/2007 Keyp av gróti - 30,00 kr./m3**

**Avgerð:** Kommunustýrið samtykti, at prísurin fyri keyp av gróti frá grundstykkjum og tílíkt skal verða kr.30,00 fyri m3.
Tá fyrispurningar koma um keyp av gróti, skal Tekniska Deild fara á staðið, og saman við eigaranum og/ella entreprinørinum meta um nøgdina av grótinum sum kommunan skal keypa, og er tann metingin bindandi fyri báðar partar.
Tekniska deild ávísur, hvar gróti skal koyrast.